# Mentakona seksti



Tann dagin í august, tá ið vit minnast, at Sovjetsamveldið gjørdi innrás í Prag fyri at fáa enda á tjekkoslovakiska várinum, fyllir Malan Johannesen 60 ár. Tjekkoslovakia er í dag tvey lond, Kekkia og Slovakia. Mong kenna Maluna úr Sjónvarpi Føroya, har hon í mong ár myndaði mentanarsendingarnar. Fyrst Gluggan saman við Berljót Hentze, og seinni stóð hon sjálv fyri avloysaranum Skáanum. Umframt tær hevur hon stílað fyri mongum øðrum menanarsendingum og lagt rødd til eina ørgrynnu av sendingum bæði í út- og sjónvarpi. Tey seinnu árini hevur Malan starvast á skrádeildini hjá sjónvarpinum. Á ungum árum fekk Malan herviliga giktsjúku at dragast við, men hóast hon hevur sett djúp spor og hevur volt nógva pínu, hevur Malan varðveitt sítt víðskygda sinni og ljósu lívsfatan.

Malan er fødd í Vestmanna sum tann triðja av fýra systkjum. Tey mistu tíðliga pápa sín, Martin Johannesen, sum sló út av skipi. Mamma teirra, Annika, var av Djurhuus-ættini í Kollafirði. Hon seymaði fyri fólk og gjørdi mangt annað arbeiði fyri at geva børnunum gott í beinið, so tey kundu fáa sær útbúgving. Malan hevur studentsprógv frá studentaskeiði í Keypmannahavn og er cand.phil. í norðurlendskum frá universtitetinum í Keypmannahavn, har hon búði á Garði meginpartin av lestrarárunum. Tá ið hon hevði skrivað høvuðsritgerð um føroyskar barnabøkur kom hon heim og var studentaskúlalærari í Hoydølum í donskum. Tað skeiðið í frálærukynstri, sum studentaskúlalærarar skulu taka eftir loknan lestur, fór Malan niður aftur til Keypmannahavnar at taka á tí bókmentaliga gitna studentaskúlanum Metropolitanskúlanum – tað er har skaldsøgan Det forsømte forår eftir Hans Scherfig fer fram. Mong munnu tey vera sum minnast Maluna sum tann blíða, sáttliga og altíð væl grundaða læraran.

Umframt góða rødd hevur Malan eisini góðan penn. Sum úrslit av granskingarstyrki frá Fróðskaparsetrinum, skrivaði hon ta forvitnisligu greinina "Sum himmalsins fuglar" um uppvøkstur í 1950-árunum, tá børnini høvdu góðar umstøður at mennast gjøgnum spæl, sum tey sjálvi skipaðu fyri, samstundis sum nógv kundu fylgja við hvussu foreldrini arbeiddu, tí arbeiðsplássini vóru í nánd og opin. Nakrar skemtiligar søgur við broddi eru komnar frá hennara hond og mangar frálíkar týðingar serliga av yrkistekstum. Við sínum serliga dirvi og skemtingarsama áræði hevur hon sett ferð á á mongum fundum eitt nú á altjóða kvinnustríðsdegnum í heimbygdini, í bátafelagi og í felagsskapum hjá fólkum, sum eru sjúk og bera brek.

Malan fylgir væl við í bókmentaligum, filosofiskum og politiskum viðurskiftum, og hon hevur altíð havt stóran áhuga fyri lívskorum og hugsanum víða um. Tí vísti hon ofta samhug við kekkar og slovakar við at møta upp á mótmælisfundum teirra á føðingardegi sínum, meðan hon búði í Keypmannahavn.

Malan eigur dóttrina Ásu, sum er M.Sc. í djóraatburði. Í løtuni starvast hon so langt burturi sum í Uzbekistan.

Vit ynskja Maluni hjartaliga tillukku við degnum og alt tað besta.

**Vinirnir**

# Realskúlanæmingar í 1964



Mynd frá realskúlaframsýningini sum Jórunn Dánialsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Her er ein mynd, sum er tikin fyri 45 árum síðan í Sandágerði av einum realskúlaflokki í 1964.

**Aftast f.v.:** Rannvá Lindarstein, Maria Mortensen, Bogi Mikkelsen, Johan Jacobsen, Jógvan við Ánna (lærari), Karstin Simonsen og Bjartur Dalsgarð.

**Fremra rað f.v.:** Peddy Davidsen, Anna Katrina Næs Joensen (Dukki), Ólavur Michelsen, Bergur Djurhuus, Birgir Mortensen, Elmar Højgaard, Steimgrím Abrahamsen og Regin Hentze.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024. (mynd nr. 307)

*Myndaeigari: Peddy Davidsen*

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Marjun Elidu Joensen, Klaksvík**, fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi fríggjadagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Betesda leygardagin kl. 13.30. Tey, ið vilja minnast Marjuna, kunnu lata Zarepta ella Leguhúsinum í Nesvík eina gávu, konta í peningastovnunum.

**Hansina Mortensen**, fødd Lisberg, ættað úr Fámjin, búsitandi í Tórshavn, andaðist á Eldrasambýlinum oman Hoydalar mikudagin, 94 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni sunnudagin kl. 15. Tey, sum vilja minnast Hansinu, kunna lata Eldrasambýlinum oman Hoydalar eina gávu, konta í peningastovnunum.

Kistan við **Almu Hammer, Hvalba**, fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjadagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Vitninum í Hvalba leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Almu, kunnu lata Zarepta eina peningagávu. Konto í peningstovnunum.

**Vilmund Hvíthamar**, ættaður úr Sandavági, búsitandi í Albertslund, andaðist á Glostrup Sjúkrahúsi mánadagin, 75 ára gamal. Jarðarferðin verður frá Opstandelseskirke í Albertslund týsdagin 1. september kl. 11.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá elskaða mamma, vermamma og omma okkara

**Ingrid Mikkelsen**
Vágur

andaðist og varð jarðað.
Takk til Símun Jacobsen, prest fyri góð og troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni.
Takk til kirkjutænarar og sangarar
Takk fyri blómur, kransar, heilsanir og peningagávur til Vágs Kirkju.
Hjartans takk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til í sambandi við jarðarferðina og ervið
Takk til tykkum mongu, ið fylgdi henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Eileen, Ingun og Unn**